# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað er altíð torført at viðgera eina neyðtøku og serliga, tá tað snýr seg um eina so unga gentu*

*Condoleezza Rice*

# Ein heimssøgulig mynd

**Tað var einki minni enn ein heimssøgulig løta, tá filharmoniska orkestrið í New York hevði konsert í Norðurkorea í gjár**

Til fyri stuttum hevði tað verið ein óhugsandi tanki at ímynda sær, at filharmoniska orkestrið í New York skuldi hava konsert í norðurkoreanska høvuðsstaðnum Pyongyang.

Men í gjár var tað heimskenda orkestrið á palli har, og fyri einari fullsettari konserthøll legði orkestrið fyri við at spæla norðurkoreanska tjóðsangin og síðani tann amerikanska. Allir teir 1.500 áhoyrararnir stóðu, meðan orkestrið spældi teir báðar tjóðsangirnar, og fagnaðurin var óførur.

Løtan var sermerkt, tí fyri minni enn fimm árum síðani setti George W. Bush, forseti, Norðurkorea í bás saman við Iran og Libya, og formliga hava USA og Norðurkorea verið í kríggi síðani Koreakríggið í fimmtiárunum.

Kortini stuðlaðu amerikonsku myndugleikarnir ferðini og konsertini, og norðurkoreanska sjónvarpið sendi ta 90 minuttir longu konsertina beinleiðis.



*109 fólk manna filharmoniska orkestrið í New York, og eitt so stórt amerikanskt ferðalag hevur ikki verið í Norðurkorea fyrr*

*Mynd: AP*

# Florida misti streymin

**Stórir partar av Florida lógu í myrkri í gjár, tí streymveitingin fór**

Klokkan var júst farin av eitt lokala tíð í gjár, tá streymurin fór í stórum pørtum av amerikanska statinum Florida. Líka úr Miami til Jacksonville á eystursstrondini til Tampa har norðuri var eingin streymur, og sambært myndugleikunum lógu 4,4 milliónir fólk í streymloysi.

Sambært elfelagnum Florida Power & Light var tað eitt tekniskt brek, sum gjørdi, at streymurin fór, og myndugleikarnir í Washington vóru skjótir at boða frá, at streymslitið hevði einki við yvirgang at gera.

Fýra tímar seinni kom streymurin aftur.



*Hesin handilin í Miami var opin hóast streymslitið*

*Mynd: AP*

# Bað um umbering fyri neyðtøku

**Amerikanski uttanríkisráðharrin bað japanar um umbering fyri, at ein amerikanskur hermaður hevur neyðtikið eina 14 ára gamla japanska gentu**

- Vit eru sera hørm um tað, sum er hent, segði Condoleezza Rice, tá hon kom til Tokyo í morgun.

Japanar eru í øðini, tí ein 38 ára gamal amerikanskur hermaður hevur neyðtikið eina 14 ára gamla japanska gentu á oynni Okinawa, har fleiri túsund amerikanskir hermenn hava støð. Málið hevur eisini fingið nógva politiska umrøðu, og fleiri japanskir politikarar hava sagt, at tilburðurin eigur at fáa avleiðingar fyri viðurskiftini við USA.

Neyðtøkan hevur minst nógvar japanar á tilburðin, tá ein amerikanskur hermaður neyðtók eina 12 ára gamla gentu á Okinawa í 1995. Ta ferðina kravdu fleiri japanar teir amerikonsku hermenninar úr Japan.

## STUTT SAGT

### Ikki bara evruna

Kanningar í Íslandi hava víst, at meirilutin av íslendingum vilja sleppa upp í ES, og aðrar kanningar hava víst, at nógvir íslendingar vilja hava evruna ístaðin fyri ta íslendsk krónuna.Tí var tað ikki so løgið, at íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde, bleiv spurdur um hesi viðurskifti, tá hann var í Bruxelles í vikuni. Millum annað vildi Jean Claude Juncker, forsætisráðharri í Luksenburg, hava at vita, um nakað er í tosinum um, at íslendingar kanska fara at brúka evruna uttan tó at fara upp í ES. Men hann fekk at vita, at tað er ikki ætlanin. Juncker svaraði, at tað er gott, tí tað hevði neyvan verið heilt makaleyst hjá íslendingum at brúka evruna uttan at fara upp í ES.

### Stríð um val

Andstøðan í Nigeria hevur kravt, at forsetavalið í fjør verður ógildað, tí valið umfataði als ikki alt landið, og at myndugleikarnir tí svikaðu, fyri at Yar'Adua skuldi vinna valið. Men ein dómstólur hevur nú havnað kravinum frá andstøðuni. Hon ætlar sær tó ikki at gevast so og hevur lovað at leggja málið fyri landsins hægstarætt. Sambært andstøðuni fingu veljararnir í fleiri landspørtum ikki høvi at velja í fjør, og tí krevur hon, at úrslitið verður ógildað, og at umval verður í næstum.

### Doyði av fuglakrími

Fuglakrím krevur framvegis mannalív í Landssynningsasia. Í gjár boðaðu myndugleikarnir í Vietnam frá, at har var ein kvinna deyð av sjúkuni, og at hon var tað fjórða fólkið í Vietnam, sum hevur latið lív av fuglakrími higartil í ár. Síðani sjúkan tók seg upp, hava 105 vietnamesar fingið sjúkuna, og av teimum eru 51 deyð. Kvinnan, sum doyði fyrradagin, bleiv smittað tveir dagar frammanundan, eftir at hon hevði handfarið sjúkan fugl, siga heilsumyndugleikarnir.